# Yvirlitstroling – MH/JS samtroling

**Jákup Sverri, túrur nr. 2111**
**Tíðarskeið: 5-15/3 2021**
**Ábyrgd:** Lise H. Ofstad

**Endamál:** *At fáa til vega samanberingar taltilfar, ið skal nýtast í sammetingini av veiðuevninum við Magnus Heinason. Hetta innber at skráseta veiðuna av toski, hýsu, upsa, longu og gulllaksi o.o. fiskasløgum; t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu fiskasløgum. Eisini skal tal, vekt og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg í veiðuni og magakanningar skulu gerast av toski, hýsu, upsa, longu og gulllaksi og øðrum fiskasløgum, sum kanningarleiðarin gevur boð um*.




## Samandráttur

Hetta var seinni túrur í samtroling við Magnusi Heinasyni. 35 støðir vórðu tiknar og allar vórðu góðkendar. Fyri báðar samtrolingstúrarnar vórðu 56 støðir tiknar íalt . Nakað av tekniskum trupulleikum vóru á túrinum, men sum heild riggaði alt so nøkulunda. Lodna varð fingin á tveimum støðum vestanfyri og varð eisini funnin í fiskamagum. Veiða, tal av nytrum, magar v.m. sæst í Talvu 1.



*Mynd 1. Samtrolingar.*

## Um túrin

Vit fóru av Havnini kl. 23:00 fríggjakvøldið 5. mars. Sigldu suður á Munkagrunnin at samtrola við Magnus Heinason. Tóku 6 støðir bæði leygardagin og sunnudagin. Sunnukvøldið 7. mars fór Jákup Sverri inn á Havnina vegna trupulleikar við kølianlegginum. Fóru avstað aftur mánakvøldið. Tóku 4 støðir týsdag og so innaftur vegna trupulleikar. Mikudagin landaði Magnus Heinason og bæði skipini fóru út aftur mikukvøldið. Restin av túrinum gekk sum ætlað, lógu tó bakk leygardag seinnapart til út á sunnudagin. Mánadagin hevði Magnus Heinason tikið allar sínar 100 støðir og komið varð inn á Havnina mánadagin 15. mars kl. 18.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3) og havtasku (bústig 1-5, egin).

## Reiðskapur

Stjørnutrol við 40 mm meskum í posanum. Rockhopper grunnur (24-24in), Seahunter Vágslemmar (6.5$m^2$ ; 2.250kg). 60 m breitlar. Ekkolodd EK80 (18, 38, 70, 120, 200 og 300 kHz). SIMRADTV80 sensorar á fiskilínuni og lemmunum. Starmon-Oddi temperatur og -dýpdarmátari festur í stálslíra á høvðuslínuni.

## Viðmerkingar

Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

## Fólk við frá Havstovuni

Lise Helen Ofstad (kanningarleiðari)

Mourits Mohr Joensen, Sigvald Kristiansen, Poul Vestergaard, Rúni Akralíð, Barbara Løwe Sørensen (lesandi) og Leon Smith.

*Talva 1. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag.*

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 11671.229 | 114 | 55 | 35 |
| TOSKUR | 2973.884 | 137 | 37 | 27 |
| UPSI | 1690.252 | 139 | 20 | 21 |
| HVÍTINGUR | 247.089 | 12 | 8 | 9 |
| LONGA | 222.411 | 44 | 6 | 11 |
| HAVMÚS | 218.905 | | | 3 |
| REYÐSPRØKA | 214.029 | 46 | 41 | 19 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 110.115 | | | 11 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 90.278 | | | 6 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 88.963 | | | 1 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 76.992 | 10 | 5 | 15 |
| KNURRHANI | 69.898 | | | 8 |
| GULLLAKSUR | 65.572 | 10 | 4 | 1 |
| TUNGA | 64.140 | 33 | 26 | 20 |
| ROGNKELSI | 55.635 | | | 10 |
| STREYMSILD | 50.808 | 10 | 3 | 5 |
| SANDSPRØKA | 30.006 | | | 9 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 23.175 | | | 4 |
| LOLIGO | 22.273 | | | 8 |
| HAVTASKA | 21.845 | 2 | 2 | 4 |
| SKØTA | 20.030 | | | 1 |
| LÝRUR | 15.470 | 3 | 1 | 2 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 14.129 | | | 4 |
| BROSMA | 11.493 | 6 | 2 | 4 |
| LÁLLA | 11.316 | | | 2 |
| LÍTLA BROSMA | 7.665 | 3 | 3 | 1 |
| STEINBÍTUR | 3.760 | | | 2 |
| SVARTKJAFTUR | 2.118 | | | 3 |
| KALVI | 1.860 | 1 | 1 | 1 |
| SILVURMURTUR | 0.329 | | | 1 |
| JÁKUPSKEL | 0.284 | | | 1 |
| RÆKJA | 0.201 | | | 2 |
| HUMMARI | 0.105 | | | 1 |
| LODNA | 0.057 | | | 3 |
| NEBBASILD | 0.036 | | | 1 |
| YMIST (ostur, skrambul v.m) | 6.967 | | | |
| TILSAMANS | 18103.319 | 570 | 214 | 35 |